

## Tað gamla húsið

Listaframsýning í Mentanarvikuni í Runavík. Tað gamla húsið, er heitið á listaframsýningini, sum verður á býráðsalinum hjá Runavíkar kommunu í Mentanarvikuni, 18. – 25. oktober. Á framsýningini fevnir m.a. um fotomyndir og grafiskt prent. Myndirnar, ið vera at síggja, eru eitt sindur ørðvísi. Hetta merkir, at í staðin fyri at taka eina flotta mynd í tí vøkru náttúruni vit hava, velur Sunrid heldur at finna mótsetningar. Eitt ikki so vakurt gamalt hús, kann síggja flott út í vakrari náttúru. Tá tað snýr seg um grafiska partin, brúkar Sunrid hús og bygningar. Hon fær íblástur frá bygningum úr stórbýum, eitt nú russiskum byggihátti umframt gomlum føroyskum húsum. Sunrid í Gong er 29 ára gomul, hon er útbúgvin fotografur og starvast dagliga í hesum yrkinum. Hon hevur atelier í Saltangará, har hon hevur nógvar ymiskar uppgávur, men tekur sær nógv av portret fotograferingum: Framsýningin er opin allar dagar í Mentanarvikuni frá kl 15.00 til 18.00.

# Leif orkar ikki meira



**- Sum støðan er í dag, fremja karmarnir í Føroyum einans steakhouse-, pitsa- og barr-matstovur eftir útlendskum leisti, sigur Leif Sørensen, kokkur, við grams.fo**

MATSTOVUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í bløðunum fríggjadagin stóð at lesa í lýsing, at matstovan, Gourmet, var til sølu.

Síðani hann í 2006 byrjaði matstovuna, hevur Leif Sørensen roynt at rikið eina føroyska matstovu á høgum støði, men hetta hevur ikki gingið eftir vild.

Roknskapirnir siga, at fíggjarliga úrtøkan ikki hevur verið nóg góð, og nú gevur Leif Sørensen skarvin yvir.

-Nú orki eg ikki at lyfta hesa uppgávu longur og tí stingi eg í sekkin, sigur Leif Sørensen við grams.fo.

- Vit hava okurs innkeypsprísir, høgar vínprísir, 25% mvg og vit kunnu ikki seta prísirnir til tað, ið teir áttu at verið, tí tann føroyski marknaðurin er so lítil.

-Sum støðan er í dag, fremja karmarnir í Føroyum einans steakhouse-, pitsa- og barr-matstovur eftir útlendskum leisti, sigur hann millum annað í viðtali við grams.fo.

*Eftir at hava rikið matstovuna, Gourmet, í nærum fýra ár, hevur Leif Sørensen givið skarvin yvir. Føroyska samfelagið er ikki gearað til matstovur av betra slagnum, er boðskapurin*

# Burturvístir sjómenn aftur í Fiskimannafelagnum

**Teir fýra sjómenninir, sum blivu burturvístir úr Fiskimannafelagnum, fáa nú boð um, at teir aftur eru limir. Tað avgjørdi nevndin í Fiskimannafelagnum hóskvøldið.**

BURTURVÍSING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóskvøldið var nevndarfundur í Føroya Fiskimannafelag. Á skránni var millum annað burturvísingin av teimum fýra monnunum, sum fyri kortum vóru burturvístir av formanninum, Jan Højgaard.

Nevndin avgjørdi, at menninir skulu innlimast aftur.

Sostatt er avgerðin, sum formaðurin í Fiskimannafelagnum einsamallur tók, sett úr gildið. Tað váttar Eyðun Johannesen, næstformaður í felagnum.

- Menninir eru tiknir innaftur. Teir vórðu ikki koyrdir úr á rættan hátt, og tí gjørdi nevndin av at taka teir innaftur í felagið. Tað fáa teir bræv sendandi um fyrsta dagin, sigur Eyðun Johannesen.

Avgerðin er endalig, og tað, at menninir mynstraðu við Carlton, sjálvt um hann var lagdur, fær sostatt ongar avleiðingar fyri teir fýra menninar.

Tað fær heldur onga avleiðing fyri formannin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard, at hann av sínum eintingum burturvísti menninar, uttan at tað var viðgjørt í nevndini áðrenn.



*Eyðun Johannesen, næstformaður í Føroya Fiskimannafelag, váttar, at nevndin kolldømdi avgerðina hjá formanninum, og hevur tikið avgerð um, at burturvístu menninir aftur verða limaðir inn*

Savnsmynd